## UTTAN ÚR HEIMI

## Fer ikki frá við góðum

Formaðurin í konservativa flokkinum í Bretlandi, Iain Duncan Smith, gjørdi á landsfundi floksins hósdagin greitt, at hann hevur ongar ætlanir um at leggja frá sær. Tvørturímóti ávaraði hann sínar floksfelagar ímóti at leggja seg í vegin fyri, at hann og flokkurin kunnu endurvinna stjórnarvaldið í Bretlandi.

Formaðurin hevur verið fyri hvøssum atfinningum í seinastuni, og á landsfundinum hava fleiri røddir verið frammi um at fáa flokkinum annan formann. Nógvir flokslimir ásanna, at formaðurin hevur ikki megnað at leiklutin sum andstøðuleiðari, og at flokkurin heldur ikki virkar, sum ein rættiligur andstøðuflokkur eigur at virka. Men Iain Duncan Smith lat sínar floksfelagar vita, at eingin skal ditta sær at bjóða honum av.

- Annaðhvørt fylgja tit mær, ella fylgja tit Tony Blair. Tað er eingin annar møguleiki. Komið við ella farið hiðani. Vit hava eina uppgávu at loysa, segði konservativi floksformaðurin.

## Arnold skal samstarva

Nývaldi guvernørurin í Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, er farin undir at manna eina nýggja umsiting, sum skal loysa teir ovurstóru búskaparligu trupulleikarnar hjá statinum.

Tað eru royndir menn, sum skulu hjálpa honum. Hann hevur sett kongresslimin David Dreier at leita eftir teimum bestu fólkunum til umsitingina, sum telur 200 fólk, og Dreier hevur longu sagt, at hann fer at leggja dent á at finna fólk, sum hava drúgvar royndir, og sum hava víst síni evni á teimum ymsu økjunum.

Schwarzenegger er tann fyrsti republikanski guvernørurin í Kalifornia í seks ár, men hann noyðist at arbeiða saman við demokratunum, tí teir eru í meiriluta í tinginum í Sacramento. Sjálvur ivast guvernørurin ikki í, at tað fer at bera til. Hann vísir á, at úrslitið av guvernørvalinum var ein greiður boðskapur um, at veljararnir í Kalifornia vilja hava broytingar, og tað mugu demokratarnir eisini skilja, sigur hann.

## Nógvar fyritøkur á húsagang

Ongantíð eru so nógvar norskar fyritøkur farnar á húsagang sum í ár. Síðani á nýggjárinum eru 4.825 fyritøkur farnar á húsagang, og tað hevur havt við sær, at 18.000 fólk eru vorðin arbeiðsleys, skrivar Aftenposten. Samanborið við í fjør eru húsagangirnir øktir 17 prosent, og vinnan roknar við, tað endaliga talið verður størri enn í 1992, sum er metár higartil. Tað árið fóru 5.856 norskar fyritøkur á húsagang.

Á vinnulívsdeildini í Den norske Bank verður sagt, at serliga í Oslo og hinum stóru býunum eru nógvar fyritøkur farnar á húsagang, men at gongdin kortini hevur ta størstu ávirkanina í útjaðaraøkjunum. Eitt nú eru nógvar fyritøkur í fiskivinnuni og alivinnuni í Finnmørkini og Troms givnar við virkseminum.

Aðrastaðni í landinum eru tað serliga fyritøkur í hotell-, matstovu- og ráðgevingarvinnunum, sum noyðast at lata aftur. Slíkar fyritøkur halda serliga til í býunum.

## Nú er hann Sir Roger

Í Bretlandi hevur Elizabeth drotning givið filmsleikaranum Roger Moore riddaraheiti, so nú kann hann rópa seg Sir Roger.

Roger Moore fekk riddaraslag á einum hátíðarhaldi á Buckingham Palace hósdagin, har drotningin eftir gomlum siði legði eitt svørð á akslar hansara. Aftaná greiddi tann nýsligni riddarin frá, at hóast hann hevur spælt ein hóp av filmum, hevði hann ongantíð verið so fjálturstungin sum hendan dagin.

Enski rocksangarin Sting var eisini hjá drotningini hósdagin. Hann fekk ikki riddaraheititað, men OBE-ordanin. Sting, sum í veruleikanum eitur Gordon Summer, kann nú skriva seg Gordon Summer OBE. Aftan á hátíðarhaldið helt Sting fyri, at tað mundi vera vantandi kunnleiki hjá drotningini til tónleik hansara, sum gjørdi, at hann ikki gjørdist Sir Gordon.

# Friðarheiðursløn fyri mannarættindum og demokratii

*Shirin Ebadi avmyndað í Teheran*
*Mynd: Reuters*



**Iranska mannarættindastríðskvinnan Shirin Ebadi fekk ársins Nobel-friðarheiðursløn.**

Tað kom ikki sørt óvart á mong, tá norska Nobel-nevndin í gjár kunngjørdi, at hon hevði gjørt av at lata iransku mannarættindastríðskvinnuni Shirin Ebadi ársins friðarheiðursløn.

Undan fráboðanini væntaðu tey flestu, at annaðhvørt Jóhannes Páll pávi ella fyrrverandi kekkiski forsetin Vaclav Havel fór at fáa heiðurin í ár, men tað vóru eisini tey, sum nevndu júst Shirin Ebadi sum eitt evni.

Nobel-nevndin sigur í sínum grundgevingum, at Shirin Ebadi hevur verið undangongufólk í arbeiðinum at útvega iranska fólkinum demokratisk viðurskifti og at verja mannarættindini. Hon er ikki bara ein fyridømi fyri sínar samsintu landsmenn, men fyri øll, sum stríðast fyri demokratii og mannarættindum allastaðni kring heimin.

Nobel-nevndin dylir í grundgevingunum heldur ikki fyri, at avgerðin at lata Shirin Ebadi heiðurslønina er ætlað at skunda undir størri demokrati og betri mannarættindi, har hei viðurskifti ikki finnast í dag.

Shirin Ebadi segði við norska sjónvarpið í gjár, at hon var sera fegin um at hava fingið Nobel-friðarheiðurslønina, og hon segði seg vóna, at avgerðin hjá norsku nevndini fer at fáa ávirkan á arbeiðið fyri demokratii og mannarættindum.

Shirin Ebadi er tann fyrsta muslimska kvinnan, sum fær friðarheiðursløn Nobels.

# Innanhýsis kríggj í Bush-stjórnini

**Amerikanska stjórnin gongur í bólkum, og rættiligt rok er millum týðandi bólkar og ráðharrar í stjórnini.**

USA
*Árni Joensen.*
*fartekst@mail.dk*

Ein av teimum erkakonservativu og týðandi amerikonsku politikarunum viðgongur bart út, at kríggj er í stjórnini hjá George W. Bush, forseta.

- CIA er í opnum stríði við Hvítu Húsini, og als einki samstarv er millum uttanríkisráðið og verjumálaráðið, skrivar William Kristol í grein í blaðnum Weekly Standard, har hann lýsir viðurskiftini sum innanhýsis kríggj. Kristol verður vanliga roknaður sum ein av fremstu stuðlunum hjá Bush, forseta.

Upprunin til rokið er sambært eygleiðarum avgerðin hjá frosetanum at seta Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra uttanfyri, tá forsetin herfyri setti ein bólk, sum skal virka fyri støðugum viðurskiftum í Irak. Vanliga verður ein tílík uppgáva hildin at hoyra verjumálaráðnum til, men Bush valdi ístaðin at lata Condoleezzu Rice, trygdarráðgeva fáa uppgávuna. Eygleiðarar tulka hetta sum eina roynd hjá forsetanum at doyva leiklutin hjá Rumsfeld og øðrum heykum í stjórnini, nú valstríðið upp undir næsta forsetavalið fer at nærkast.

Bretska blaðið The Financial Times skrivar, at avgerð forsetans kann eisini hava samband við, at Condoleezza Rice og hini í tjóðskaparliga trygdarráðnum halda, at verjumálaráðið hevur tikið fleiri av teirra uppgávum, og at tey nú vilja hava tær aftur.

Tá Donald Rumsfeld mikudagin varð spurdur, hvussu tað bar til, at hann ikki hevði fingið skrivið um tann serliga Irak-bólkin, var tað týðiligt, at verjumálaráðharrin hevði ilt við at fjala sína misnøgd.

- Eg havi longu sagt, at eg veit ikki hví. Er tað svarið ikki nóg greitt? Ella skilja tit ikki enskt? Eg var ikki har, segði Rumsfeld sambært Financial Times.



# Finalan Gospel 2003

**Leygarkvøldið kl 20.00 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði verður finalan í tí fyrsta Gospel prixnum í Føroyum. Luttakandi bólkar eru: I Am, Direct Level, Braquet og In Gethsemane**

**Tíðindaskriv**



*Braquet, sum kom í finaluna í Prix Føroyum í vár, verður ein av bólkunum í Gospel Prix finaluni*

Tað hava verið tvey undanumfør, tað fyrra var 13. september. Tá luttóku 4 bólkar: Trace úr Vágum, Scot úr Eysturoynni, Direct Level av Strondum og I Am úr Klaksvík. Vinnarin gjørdist I Am, og Direct Level bleiv nr 2. Tað seinna undanumfarið var 27 sept. Tá luttóku 5 bólkar: Thirst úr Eysturoynni, Credo úr Klaksvík, Crescendo úr Havn, In Gethsemane og Braquet úr Eysturoynni. Tá fekk Braquet besta viðmælið frá dómarunum, In Gethsemane gjørdist nr. 2 og Credo gjørdist nr. 3.

### Hví Gospel Prix?

Felagið aftanfyri tiltakið Gospel 2003 er Føroya Gospeltónleikafelag. Felagið hevur áður í fleiri ár skipað fyri Gospelfestivalinum í Føroyum, og nú eru so stig tikin til at skipa fyri einum prix'i fyri Gos-peltónleikarar. Stigtakarnir hava fleiri ára royndir sum tónleikarar og fyriskiparir av Gospeltiltøkum, og út frá teirra royndum meta teir, at tíðin er búgvin at royna slík tiltøk í Føroyum. Hetta er ikki nakað nýtt í øðrum londum. Høvuðsendamálið hjá felagnum er at menna Gospeltónleikin í Føroyum, og tað kann væl gerast við einari kapping. Tað er umráðandi at kristnir tónleikarar sleppa at spæla tónleik teimum dámar, og á tann hátt kunnu luta við onnur, tað, sum liggur teimum á hjarta, gjøgnum sín tónleik. Nú tiltakið nærkast endanum, kunnu fyrireikarnir gleðast um, at fleiri nýggir bólkar eru stovnaðir, og at flestu bólkarnir spældu egið tilfar, hóast tað ikki var nøkur treyt.

– Vit eiga at skapa karmar fyri føroyskar Gospelbólkar, so teir kunnu spæla og menna seg í umhvørvi, sum er lagað til teirra. Vit tosa als ikki um hvør vítt teir eiga at fara til Prix Føroyar ella ikki, tað er upp til hvønn einstakan bólk, men tað er heilt hvør sítt umhvørvi og karmar, siga fyrireikararnir.

### Finalan

Fyrst spæla allir bólkarnir 3-4 sangir hvør. Síðan fara dómarnir at telja saman og ímeðan syngja nakrir gestasangarar. Tað er bólkurin Salt úr Eysturoynni, tey syngja ómetaliga væl og ofta a cappella. Bólkur nr 3 og 4 fáa eitt gávukort hvør til tónleikaútgerð frá Elding. Nr 2 fær upptøkutímar í Studio Pegasus í Klaksvík og vinnarin fær bjóðað eina ferð til ein festival uttanlanda frá Maersk. Vinningarnir skulu eisini vera við til at geva bólkunum eitt skump víðari.

Rás 2 sendir beinleiðis frá tiltakinum og umframt tónleik, verða eisini nakrar stuttar samrøður við luttakarar og onnur.

### Arni spælir við trimum bólkum

Viðmerkjast kann, at Arni spælir við trimum av hesum bólkunum. Við tveimum er hann fastur maður, og tí eina bert til hetta tiltakið. Tað er eitt sindur óheppið, tí summi ivast í dygdini ella meiningini við tiltakinum, tá sami persónur, skal spæla móti sær sjálvum í trimum av fýra bólkum. Men um vit kenna bólkarnar ella lesa tað, sum er skrivað um teir, síggja vit, at I Am, Direct Level og Braquet eru tríggir heilt ymiskir bólkar. Kjarnan í tí fjórða bólkinum er Ingi, Olivia og Jóhan Magnus, og tí er hann eisini serstakur. Tey hava valt og skrivað sangirnar, hava ábyrgd av tí endaliga bílætinum, og Olivia syngur.

Hetta er fyrstu ferð, tað verður skipað fyri einum tílíkum tiltakið í Føroyum, og treytirnar fyri luttøku eru ikki so harðar, sum tær evt verða seinni, og tað er fyri at fáa gongd á.

Nevnast kann, at minsta luttakaratal av bólkum, fyri at tiltakið kundi fremjast, var 8 bólkar. Tað vóru fyrst 12 bólkar, men 4 góvu avboð, av ymiskum orsøkum, ein kom tó viðaftur seinni, og In Gethsemane bókstaviliga teknaði seg, fyri at tiltakið kundi fremjast.

Við at loyva, at sami luttakari kundi spæla í fleiri bólkum, men tó ikki vera frontfigurur, vónaðu fyrireikarnir, at bólkar, sum ikki fingu manna lið áðrenn freistin var úti, kundu fáa hjálp frá tónleikarum, sum evt longu vóru í einum bólki. Hetta gjørdu so Braquet og In Gethsemane!

I Am er upprunaliga úr Klaksvík. Teir byrjaðu at spæla í 1996, og teir, sum spældu við, vóru: Eyðbjørn bass og kór, Heðin keyboard og kór, Mikkjal guitar, Jóel trummir og Birgir sang. Nú spælir Hans Ove trummir og Arni guitar. Seinni í ár kemur teirra næsta fløga út.Teir hava luttikið í Prix Føroyum og hava fleiri ferðir spælt uttanlanda fyri nógvum áhoyrarum.

Direct Level er av Strondum, hetta er ein nýggjur bólkur, og teir, sum spæla við eru: Johnny guitar, Dan guitar og sang, David bass og Signar trummir. Teir flestu hava spælt í fleiri ár til lovsang í samkomuni Keldan, men hetta er fyrsti bólkur, teir hava stovnað. Til fyrra undanumfar tóku teir næstan øll á bóli við sínum tónleiki, ógvuliga flott »debut« má sigast.

Braquet er úr Eysturoynni, teir hava spælt til ymisk tiltøk áður, t.d. komu teir í finaluna í Prix Føroyum fyrr í ár. Teir byrjaðu at spæla saman, meðan teir gingu í skúla á Kambsdali, og seinni stovnaðu teir so bólkin Braquet. Teir, sum spæla við eru: Arni guitar, Jóhan trummir, Andrias sang og Pætur bass, men til hetta tiltakið hevur Ingi spælt bass, tí Pætur kundi ikki.

In Gethsemane er úr Eysturoynni, hetta er ein nýggjur bólkur. Tey, sum manna bólkin, eru: Ingi bass, Olivia sang og Jóhan Magnus keyboard og kór. Gestatónleikarar eru Arni guitar og Jóhan trummir.



*Fløguaktuellu I Am var millum fyrstu bólkarnar, sum tryggjaði sær pláss í Gospel Prix finaluni*